# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Føroyska svimjilandsliðið skal nú royna seg í EM á stuttbana*

# Fimm svimjarar til EM í Kroatia

**Í hesum døgum eru fimm føroyskir landsliðssvimjarar í Kroatiska býnum Rijeka, har teir í spildurnýggjari svimjihøll luttaka í Evropameistara-kappingini í stuttbana**

SVIMJING
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Svimjilandslið, og kanska serliga Pál Joensen, hava áður havt sera góð úrslit úti í heimi. Nú sleppur hann aftur at vísa sítt virði, tá ið hann og hinir fýra landsliðssvimjararnir, Elspa Mørkøre, Kári J. á Høvdanum, Shaila millum Garðarnar og Mona Simonsen skulu luttaka í EM í stuttbana, sum verður svomið í Kroatia.

### Lítil heiðursmerkjavón

Fyrr í ár framdi Pál Joensen eitt satt bragd, tá ið hann vann heili trý gullheiðursmerki við HM fyri juniorar í Beograd, Serbia. Nú er aldursbólkurin ein heilt annar, nevniliga seniorar. Støðið her er nakað væl hægri, og tað verður trupult at vinna nakað heiðursmerki. Ikki heilt óvæntað metir Jón Bjarnason, landsliðsvenjari, at Pál Joensen er største heiðursmerkjavón føroyinga.

- Pál er besta boð uppá ein sum kann geva okkum vónir. Tað er sjálvandi stórur munur á juniorum ig seniorum, men ein góðan dag hevur man loyv at hava medaljuvón. Tað krevur at alt gongur sum tað skal og so eitt eisini eitt sindur av hepni, sigur Jón Bjarnason í telefonini úr Rijeka, og sigur at vit kunnu vænta góð úrslit frá Páli 400m frí og 1500m frí.

### Fyrimunur

Nógv hevur verið kjakast um at fáa nýggjan 50 metrar langan svimjihyl her í Føroyum, men svimjingin í 25 metrar longu hyljunum, sum svimjararnir hava verið noyddir at tikið til takkar við, kann nú koma okkum til góðar.

- Vit hava bara stuttbana her heima, so tað er heilt sikkurt ein fyrimunur hjá okkum í hesari kappingini. Á stuttbana ræður tað nógv um ferðina, meðan konditiónin telur á langbana, sigur Jón Bjarnason, sum tó sjálvur framvegis heldur fast um, at ein 50 metrar langur hylur er eitt krav í Føroyum.

- Tú kanst sammeta tað við at fótbólturin fær ein lítlan vøll at spæla á, og so skal spæla á einum stórum vølli úti í Evropa. Tað gongur ikki, sigur Jón Bjarnason.

# Cypriotiski dreymurin brast

**Anorthosis tapti í Grikkalandi, og sigurin hjá Werder Bremen sendi cypriotisku sensatiónina heilt úr Europa**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Anorthosis Famagusta hevur verið stóra positiva upplivingin í ársins útgávu av Champions League. Men í gjár endaði ævintýrið hjá lítla cypriotiska stórfelagnum.

Á útivølli megnaði Anorthosis ikki at basa Panathinaikos, og tí vunnu griksku meistararnir seg víðari. Og tá Werder Bremen samstundis basti Inter bar hetta við sær, at tað verður týska felagið, sum fær sessin í European League, sum UEFA-Cup kappingin nú eitur.

### Chelsea um snarið

Trýst var eisini á enska Chelsea, sum skuldi vinna heimadystin móti Cluj-Napoca, um teir skuldu verða heilt vísir í at koma víðari.

Hetta eydnaðist eisini, men tað tók sína tíð, áðrenn Didier Drogba í seinna hálvleiki sigursmálið. Men tá Roma samstundis vann á Bordeaux, hevði hetta ikki tann heilt stóra týdningin.

## Úrslitini

| | |
|---|---|
| **Bólkur A** | |
| Chelsea-Cluj-Napoca | 2-1 |
| Roma-Bordeaux | 2-0 |
| **Bólkur B** | |
| Panathinaikos-Anorthosis Famagusta | 1-0 |
| Werder Bremen-Inter | 2-1 |
| **Bólkur C** | |
| Basel-Sporting Lisbon | 0-1 |
| Barcelona-Shakhtar | 2-3 |
| **Bólkur D** | |
| PSV-Liverpool | 1-3 |
| Marseille-Atlético Madrid | 0-0 |

## Hans Jørgensen fær góð skoðsmál

Hans Jørgensen fær á heimasíðuni hjá FC Amager góð skoðsmál frá venjaranum Michael Madsen. Núverandimálverjin, 40 ára Stefan Campagnolo, hevur ikki nógv ár eftir á fótbóltsvøllinum, og høvuðsvenjarin vísir tí unga skálamanninum álit.

- Yngru leikararnir hava ment seg nógv. Hans Jørgensen hevur gjørt stór framstig, og Stefan Campagnolo nærkast teimum 40 árunum, og hevur familju og børn. So eg vænti, at Hans fer at spæla. Honum vantar nøkur kilo á kroppinum, men eg vænti mær nógv av honum, sigur Michael Madsen, og leggur afturat, at Erling Jacobsen og Páll Klettskarð heldur ikki eru langt frá spælitíð á besta liðnum.

**-uni**

## Teitur vísti Brøndby aftur

- Eg var til royndarvenjing í Brøndby, FC Midtjylland og OB. Brøndby og OB bjóðaðu mær pláss, men eg valdi OB, tí eg kendi meg meira heima her í felagnum.

Tað eru nú nakrir mánaðir síðan, at 16 ára gamli málverjin Teitur Gestsson skifti tilveruna í Klaksvík út við Danmark og OB. Higartil hevur gingist honum væl, og dreymurin er heilt vist at røkka longri enn bestu donsku fótbóltsdeildini.

- Dreymurin er sjálvsagt at standa seg í Superliguni. Og síðan víðari til stóru feløgini í útlandinum, sigur Teitur Gestsson við Fyens Stiftstidende.

17 ára gamli Viljormur Davidsen er eisini sáttmálabundin í OB.

**-uni**